## Spyr um trygd

Nú radarin á Sornfelli er sløktur, vil løgtingskvinnan Heidi Petersen hava at vita frá løgmanni, hvat hann ætlar at gera fyri at tryggja eftirlitið við føroyska loftrúminum. Í einum munnligum fyrispurningi spyr hon, nær eftirlit verður aftur við loftrúminum, hvør skal hava tað, og hvørjar treytir viðkomandi fær. Harafturat vil hon hava at vita frá løgmanni, um hann heldur tað vera skilagott, at føroyingar standa fyri eftirlitinum.

## Partabrævaskúli

Áhugin fyri partabrævahandli tykist vera stórur. Tá Eik um vikuskiftið boðaði frá, at bankin fór at skipa fyri einum partabrævaskúla um mánaðarskiftið, var skúlin næstan fult teknaður eftir bara nøkrum fáum tímum. Kortini eru nøkur pláss eftir til skúlan, sum verður í bankanum týsdagin tann 30. januar frá kl. 9 til 12. Eik skipar fyri partabrævaskúlanum saman við Dansk Aktionærforening, og stjórin har stendur fyri frálæruni.

# Tvinnar broytingar fyri at fáa kvinnur á ting

**Broytingin skal galda fyri uppstillingarlistarnar, og listaatkvøðurnar skulu býtast eftir kyni**

KVINNUR Á TING

Um ársskiftið sendu Javnstøðunevndin og Demokratia (Nevndin fyri øktum kvinnuleikluti í politikki) í felag bræv til landsstýrismenninar, ið vara av málsøkjunum javnstøðu ávv. valskipan.

Í brævinum mæla nevndirnar landsstýrismonnunum til at leggja fyri Føroya løgting uppskot um broyting í løgtingslóg um val til Føroya Løgting.

Mælt verður til tvinnanda broytingar.

Hin fyrra er at staðfesta, at § 8 í løgtingslóg um javnstøðu er galdandi fyri uppstillingarlistar til løgtingsval, soleiðis at umleið sama tal av hvørjum kyni skal vera á listanum, uttan so at undantaksloyvi fæst frá javnstøðunevndini.

Hin seinna er at býta listaatkvøðurnar eftir kyni, soleiðis at býtið av løgtingssessum og varalimum verður javnari millum kynini við at javna tær atkvøður, ið hvørki eru persónliga greiddar fyri mannfólki ella konufólki.



*Javnstøðunevndin og Demokratia (Nevndin fyri øktum kvinnuleikluti í politikki) mælir til at gera tvinnanda broytingar til tess at fáa mannað tingið við fleiri kvinnum*

# BP á beinari kós

WILLIAMBRUNNURIN

*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

Komið er eitt stig nærri við fyrireikingunum til oljuboringina á landgrunninum í summar. Í farnu viku vitjaðu trý av umboðunum í leiðslubólkinum hjá BP í Føroyum og høvdu kunnandi fund við umboð fyri Jarðfeingið. Eftir fundin, har greitt varð frá fyrireikingunum at bora Williambrunnin, segði Hjarnar Djurhuus, føroyski stjórin hjá BP, at alt gongur sum ætlað og verður framvegis miðjað móti at bora í juli. BP er á beinari kós. Sigurð í Jákupsstovu, stjóri á Jarðfeingið sigur, at teir fingu eina nágreiniliga kunning um fyrireikingarnar til hesa næstu boring á føroyska basaltinum. –Alt sær út til at ganga, sum tað skal sigur Jarðfeingisstjórin, sum í hesum døgum hevur úr at gera við aðrar uppgávur, eitt nú komandi orkupolitikkin hjá myndugleikunum. Jarðfeingið hevur gjørt eitt nágreiligt tilmæli um, hvussu Føroyar skulu byggja út orkuna komandi árini. Hetta fer so at liggja sum grundarlag undir einum aðalorðaskifti, sum verður í løgtinginum 1. februar.



*Umboð fyri BP og Jarðfeingi á kunnandi fundi um Williamboringina.*
*Mynd Jan Müller*

# Enn ein handil til endurnýtslu

**Í morgin kl. 14 letur enn ein handil við endurnýtsluvørum upp. Hesaferð er Glyvrar staðurin.**
**- Alt yvirskotið frá handlinum fer til okkara arbeiði í Afrika, sigur Knud Lindhardsen frá donsku Sudanmissiónini.**

HANDLAR

*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Glyvrar:** Síðani í heyst hevur verið arbeitt við at fyrireika henda fyrsta handilin við endurnýtsluvørum hjá Sudanmissiónini í Føroyum.

Í Danmark hevur henda missiónsrørslan ein hóp av slíkum handlum. Í roynd og veru er hetta handil nr. 79 hjá Sudanmissiónini.

Nú er túrurin so komin til Føroyar, her handilin fer at halda til á Glyvravegi 32 á Glyvrum.

Magnhild Olsen úr Rituvík fer at standa fyri handlinum, saman við einum hópi av sjálvbodnari arbeiðsmegi.

Sum skilst er ætlanin at handilin skal verða opin seinnapart á degi.

**Yvirskot til Afrika**

Í samband við upplatingina verður eitt minni hátíðarhald í handlinum, har danska missiónsrørslan somuleiðis verður umboðað.

Byrjað verður kl. 13:30 við at sóknarpresturin í økinum, Meinhard Bjartalíð fer at hava eina andakt.

Síðani fær aðalskrivarin í Sudanmissiónini, Jens Møller Petersen orðið og kl. 14 fer so sóknarpresturin alment at lata upp handilin.

Í handlinum verður alt hugsandi at fáa til keyps fyri ein bíligan pening, bæði klæðir, skógvar, glas, porcelæn og mangt annað.

Yvirskotið frá handlinum fer til tað arbeiðið sum Sudanmissiónin ger í teimum fimm afrikansku londunum – Mali, Nigeria, Sierra Leone, Centralafrika og Cameroun, eins og teir stuðla kristnu sjónvarpsrásini SAT 7, sum sendir til tann arabiska heimin.

Har Sudanmissiónin er við arbeiðir rørslan við at hjálpa fólki við reinum vatni, heilsu, útbúgving, landbúnað, friði og við at røkka fólk við gleðiboðskapinum um Jesus.

Fíggjarætlanin hjá Sudanmissiónini javnvigar við 15 mió krónum, og fær hon eini 40% av hesi upphæddini frá teimum ymisku endurnýtsluhandlunum í Danmark - og nú eisini í Føroyum.